VÍF-Tjaldur 41-16 (20-5):

# Sorl




*Tølini talaðu fyri seg. Tjaldur fekk av at vita, tá teir leygardagin vitjaðu í Vestmanna, har eitt sera uppsett VÍF-lið vant burtur úr mótstøðuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tjaldur fekk av at vita, tá teir leygardag in rendu seg í eitt satt ódnarveður í Vest manna**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Einki er at ivast í, at vestmenningar vóru tendraðir, tá teir leygardagin hittu Tjaldur fyri heimaáskoðarunum. Tapið fyri StÍF hevði allar helst tikið fast hjá ærukæru leikarunum, og nú skuldi prógvast, at tann dysturin var ein svipsari.

Og tað gekk heldur ikki long tíð, áðrenn høllin var sannførd um, at her fór eingin ivi at vera. 10 minuttir skuldu ganga, áðrenn Tjaldur fekk fyrsta málið, og tá liðini fóru til hálvleiks, vóru longu 15 mál á muni.

Seinni hálvleikur var tískil bert ein avgreiðsluspurningur, og tó at tað gekst heldur frægari hjá Tjaldri hesa løtuna, so var tað ongan tíð nakar sum helst ivi um, at her var risa stórur munur á liðunum báðum.

### Tapið var mistak

Hjá VÍF varð dysturin soleiðis ein greið ábending um, at hóast teir vóru fyri tapi á Skála herfyri, so er eingin ivi um, at liðið ætlar sær at vera við í fremstu røð. Har hevur Tjaldur hinvegin ikki so nógv at gera í fyrstu atløgu. Serstakliga ikki nú liðið er somikið hart rakt av skaðum, men í Runavíkini verður vónað, at eitt nú Sverri Justinussen og Mortan Hansen skjótt verða tøkir aftur, soleiðis at teir aftur kunnu gera nakað um seg. Tað tykist undir øllum umstøðum soleiðis, at skothóttanin í løtuni er avmarkað til Dragisa Stojovic, og einsamallur er tað ikki tað stóra, sum hann fær gjørt.

Vestmenningar hava eisini havt nakrar skaðar at dragast við, og eitt nú er Sámal Joensen í løtuni uttanfyri. Tað eru tó fá lið í landinum, sum hava slíka breidd, sum VÍF hevur, og tí skulu tað nakað væl meira enn ein ella tveir skaddir leikarar til, áðrenn gullvónin verður løgd á hillina, um hon nakran tíð verður tað yvirhøvur.

### Dysturin í tølum

**VÍF-Tjaldur 41-16 (20-5)**
Málskjúttar:
VÍF: Áki G. Olsen 8, Áki Olsen 6, John Zachariasen 6, Ingi Olsen 5, Ólavur Brimnes 5, Piti Negru 4, Agnar Joensen 3, Fríðbjørn Seloy 2, Rógvi Nielsen 1, Petur Frank Joensen 1
Tjaldur: Dragisa Stojovic 7, Arngrím Arngrímsson 3, Zoran Sarcevic 3, Áki L. Hansen 2(1), Tórur Thomsen 1
Brotskøst: Tjaldur 4
Útvísingar: VÍF 3, Tjaldur 4
Diskvalifikatión: Tjaldur 1 (3X2 minuttir)
Dómarar úr H71: Gunnar Djurhuus & Jákup Símun Simonsen

Neistin-VB 15-22 (6-11):

# VB einsamalt á odda

**VB er framvegis einasta kvinnuliðið, sum hevur fult stigatal. Tað syrgdu tær fyri, tá tær leygardagin vunnu tryggan sigur á Neistanum**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað vóru tey bæði fremstu liðini í føroyskum kvinnuhondbólti í løtuni, sum hittust, tá Neistin og VB tørnaðu saman á Hálsi í Havn leygardagin. Í øllum førum, um metast skal eftir stigatalvuni, og at VB meinar hetta í álvara undirstrikaðu tær seinasta vikuskifti, tá tær vunnu á tvífaldu greipuvinnarunum úr Vestmanna.

Higartil hevði talan tó verið um tríggjar heimasigrar hjá VB, og tí vóru mong sera spent um, hvørt VB eisini skudli standa seg, nú tær skuldu spæla norðanfjørðs. Ikki minst tí Neistin higartil hevur sýnst vera hampuliga sterkt.

### Frálíkur málverji

Og tað var heilt skjótt, at VB vísti, at tær so sanniliga eisini dugdu á útivølli. Fyrstu løtuna løgdu tær eitt veruligt trýst á Neistan, og tó at munurin ikki gjørdist tann stóri, so kundi VB væl komið á odda við fleiri málum, vóru tær nakað neyvari í skotroyndunum.

Tað var tó hampuliga skjótt, at Neistin kom á rætta lagið. So við og við gjørdust eisini tær alt naskari. Tær komu eisini fram um VB, og brádliga vóru tað tær, sum høvdu møguleikan at leggja sjógv niður til mótstøðuna, men tær møttu tó alla tíðina einari stórari forðing. Nevnliga VB-málverjanum, Daiva, sum veruliga sýndi, at hon uttan iva fer at teljast sum ein hin allar besti málverjin hetta kappingarárið. Hetta tóktist Neistin eisini at sansa, og meðan fyrstu skotroyndirnar vórðu møttar av málverjanum, so gjørdist tað sum dysturin leið alt meira so, at skotini vórðu yvirplaserað í royndunum at sleppa inn um málverjan.

Í hinum endanum tók VB seg stútt frameftir. Ferðin á spælinum var ikki altíð eins høg, men úrtøkan var tó eini leið. Ikki minst hjá teimum báðum útlendsku. Daiva Toumaite við góðu skotroyndunum og gjøgnumbrotssterku Reda Kurkauskiene.

### Ferðin væntaði

Júst ferðin tóktist vera einasta vápnið, sum Neistin mundi hava. VB hevði undan dystinum havt trupulleikar av skaðum, og bæði Arnleyg Hjelm og Guðrun Midjord vórðu mettar sum sera ivasamar. Arnleyg fekk heldur ikki tikið lut í dystinum, og tó at Guðrun var við, so tóktist hon ikki meira enn hálv, sum hon stríddi seg ígjøgnum dystin.

Við bert tveimum skiftisleikarum var tí upplagt, at Neistin við eitt sindur av trýsti kundi møða VB-liðið, men hetta megnaðu tær ongantíð. Partvíst tí VB dugdi sera væl at toga ferðina niður, so týdningarmestu leikararnir ikki høvdu fyri neyðini at verða skiftar út, og partvíst tí mistøkini hjá Neistanum vóru alt ov mong í tali, tá roynt varð at seta ferð á. Ikki minst vóru mistøkini áfallandi nógv hjá royndu leikarunum, og tá so er, so er ilt hjá yngra ættarliðnum at lyfta liðið.

Úrslitið av øllum hesum varð eisini, at munurin so líðandi øktist millum liðini. VB hevði eina fimm mála stóra leiðslu, tá farið varð til hálvleiks, og hesa leiðsluna hildu tær fast um allan seinna hálvleik. Nú gjørdust gjøgnumbrotini hjá Neistanum eisini alsamt færri í tali, og longu eftir fyrstu tíggju minuttirnar í seinna hálvleiki mundu tey flestu ásanna, at her vendist ikki. Neistin hevði tá roynt at satsa enn meira, men mistøkini vórðu mest sum hvørja ferð revsað, og tó at Marita Hermansen hevði fleiri góðar bjargingar, tá hon kom inn í seinna hálvleiki, so gjørdi tað lítlan mun í samlaða roknskapinum, tá Neistin ikki kom ígjøgnum hinumegin.

### Spennandi í Vági

Eftir dystin var staðfestingin greið. Nevnliga at VB hevði vunnið ein tryggan sigur, og tó at spælið ikki var so reypandi, so er einki at ivast í, at VB kann røkka heilt langt í ár. Talan er kanska ikki um sama kvika kontrahondbóltin, sum liðið fyrr hevur staðið fyri. Men tær stríaðst sum vant í samfullar 60 minuttir, og ikki minst tóktust tær hava høvdið við sær í flestu avgerðunum á vøllinum. Tá so Arnleyg aftur verður tøk, umframt at Gurið Mortensen eisini kann væntast aftur innan alt ov leingi, so kann tað fara at síggja heilt spennandi út hjá liðnum.

Neistin mátti hinvegin ásanna, at tað so ikki varð hesaferð, at tær koppaðu oddaliðnum. Og skulu tær gera sær vónir um hetta framyvir, so mugu tær leggja á annan bógv. Ikki minst fremur liðiði í løtuni ov nógv mistøk, og tó at Simona Dziugyte aftur hesa ferð varð toppskjútti, so eiga skotroyndirnar frá einum somikið týðandi leikara at verða nógv neyvari, um verulig nytta skal fáast burturúr. Kanska er liðið eisini skert, tí eingin lámur er á liðnum, og hetta verður betrað, tá Jórun Ludvig aftur verður tøk, men fyrst og fremst, so møttu tær einum betri liðið sunnudagin.

### Dysturin í tølum

**Neistin-VB 15-22 (6-11)**
Málskjúttar
Neistin: Simona Dziugyte 6(2), Mildrið Jacobsen 3(1), Súna Mørk 2, Susan Brockie 2, Rakul Augustinussen 1(1), Ata Høgnadóttir 1
VB: Reda Kurkauskiene 7(1), Laila Jespersen 6, Daiva Toumaite 4(1), Mary Krosslá 2, Eydis Kjærbo 2, Eyðbritt Krosslá 1
Brotskøst: Neistin 6, VB 4
Útvísingar: Neistin 2, VB 3
Dómarar úr Tjaldri: Trygvi Mortensen & Kári Hansen



StÍF-VÍF 27-24 (14-14):

# StÍF koppaði Vestmanna




*Sóley Mikkelsen stríddist sum vant allan dystin á tamb, men hesa ferð mátti hon ásanna, at bygdafelagarnir av Skála og Strondum vóru stinnari. Ikki minst tí Kristina Griksaite – sum á myndini – hevði nakrar avgerandi bjargingar í røttu løtunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eftir tvey ára einaræðis veldi á føroysku hondbóltstindunum taptu kvinnurnar hjá VÍF annað vikuskiftið á rað. Hesaferð á Skála, har StÍF syrgdi fyri einum óvæntaðum – men uppibornum - heimasigri**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at tær seinasta vikuskifti vóru fyri óvæntaðum tapi í Vági, skudli VÍF sunnudagin reisa seg, tá tær ferðaðust inn á Skála. At talan her skuldi gerast um tvey stig, mundi fáur ivast í. Bæði tí VÍF nú í tvey ár hevur havt í serflokki besta liðið, og eisini tí úrtøkan hjá StÍF higartil hevur verið so sum so. Ein sigur móti Tjaldrinum var einasti dysturin, sum hevði kastað nakað av sær, so hóast VÍF ikki fær gjørt nýtslu av Ioanu Rápa í vetur, so líktist hetta eini yvirkomuligari uppgávu hjá VÍF.

### Innsatsurin í toppi

Men tað var tó heilt skjótt, at StÍF hevði víst, at tær undir øllum umstøðum ætlaðu sær at gera mótstøðu sunnudagin. Frá fyrsta bríksli tóktust tær vera sera tendraðar. Kristina hevði alt fyri eitt nakrar bjargingar í málinum, og umframt tær báðar útlendsku útileikararnar, so sýndu serliga Paula D. Olsen og Anna Maria Berthelsen, at tær spakuliga eru við at menna seg til at vera millum tær fremstu av føroysku leikarunum.

VÍF følnaði tó ikki. Nakrar skiftingar vórðu framdar, og brádliga høvdu tær gulu togað seg inn aftur í dystin, men hóast tær soleiðis vunnu seg framum, so gavst StÍF ongantíð.

Undan steðginum høvdu tær aftur strítt seg upp á javnt, og í fyrstu løtunum eftir steðgin vóru tær sum hvirluvindar. Serstakliga riggaði verjuspælið væl, soleiðis at VÍF ongan tíð slapp rættiliga framat, og aloftast vóru tær eirindaleysar í kontraspælinum.

### Sýndu karakter

Tað vóru tó tvær hendingar, sum í seinna hálvleiki góvu ábendingar um, at VÍF kortini skuldi fara avstað við øllum. Fyrst tá nakrar skiftingar vórðu gjørdar, við atliti til at fáa kontraspælið at rigga betri. Tomma Petersen – sum annars stóð ein góðan dyst – varð avloyst av Manuelu Stan, og Nikolina og Nicoleta vórðu sendar inn aftur á vøllin. Eina løtu gjørdi hetta, at væl kenda kontra maskinan hjá VÍF tóktist fara ígongd.

Og júst sum VÍF var um at fáa takið aftur á dystinum, fekk StÍF eitt álvarsligt skot fyri bógvin. Asta Petrauskiene var óheppin at traðka skeivt, eftir at hon hevði spælt bóltin frá sær, og so var eingin bøn. Fóturin var keiktur, og tó at hon tóktist hava ætlanir um at koma inn aftur á vøllin, so var einki at gera, uttan frá síðulinjuni at síggja liðfelagarnir stríðast móti tí, sum tóktist at gerast yvirmaktin.



*Tað var ikki minst óræddi hugburðurin hjá heimligu leikarunum í StÍF, sum gjørdi uppgávuna móti favorittunum úr VÍF gjørliga*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Ørkymlaðar

Tá hetta hendi, var bert hitt eina málið á muni millum liðini, men bakkastið tóktist bara at gera heimakvinnurnar enn treiskari. Kanska gjørdist spælið í løtum dekan ov rótut, ikki minst tí VÍF nú eisini fór at mansverja Alinu Olaru. Men stríðsviljin var so stórur, sum ongan tíð fyrr, og so dugdu leikararnir eisini at vera kaldar í avgerandi løtunum, soleiðis at bólturin fekst inn um málverjan.

Í hinum endanum sýndi Kristina Griksaite, at hon sum fáur megnar at fremja bjargingar, tá tær eru mest neyðugar, og einar tvær ferðir tók hon royndir frá púrasta leysum VÍF-leikarum.

Treiskni frá mótstøðuni og misnýttu møguleikarnir tóktust av álvara at ørkymla VÍF. Tær royndu at seta enn meira ferð á, men tá hetta kiksaði, so vórðu tær revsaðar. Serstakliga sýndi Poula, at eisini hon dugir at renna seg leysa í kontraálopum, og sum tíðin gekk, so tóktist tað alt meira sannlíkt, at her skuldi talan gerast um eina sensatión, og tá seinasta bríkslið í dystinum ljóðaði, so máttu tær hjá VÍF bara ásanna, at tær høvdu tapt fyri einum betri liði.

### Rætti hugburðurin

VÍF hevur nú tapt tveir dystir á rað, og tað í sjálvum sær boðar undir øllum umstøðum frá, at vit fáa eina væl meira spennandi kapping í ár. Trupulleikararnir hjá VÍF koma ikki minst av, at liðið nú ikki hevur Ioanu at líta á, tá verjurnar skulu opnast við skotum útifrá, men liðið telur tó somikið nógvar góðar leikarar, at tær undir øllum umstøðum átti at verið eitt gott boð upp á eitt oddalið.

Hinvegin sýndi avrikið hjá StÍF, at tær væl kunnu tosa við ímillum hini, tá berjast skal um oddasessir. Liðið telir tríggjar sera góðar útlendingar, og so tykist tað eisini, sum um yngru leikararnir á liðnum nú veruliga eru um at koma fyri seg. Ikki minst var tað merkisvert, hvussu væl tær megnaðu at standa ímóti sálarliga trýstinum, tá tað var greitt at tær vóru um at skapa eina sensatión. Hetta ber boð um, at hugurðurin hjá liðnum er hin rætti, og at tær ikki hava óneyðuga stóra virðing fyri mótstøðuni, soleiðis sum tað annars ofta er galdandi fyri lið úr niðara endanum.

At Asta meiddi sær fótin, er sjálvandi eitt álvarsligt bakkast fyri liðið, og spruningurin er sjálvandi, hvussu tað fer at ávirka liðið, um talan er um drúgvan steðg, men undir øllum umstøðum, so tykist tað víst, at hetta undir ongum umstøðum verður einasta ferðin, sum StÍF fer at arga. Er hugburðurin tann sami til komandi uppgávurnar, so er einki at ivast í, at øll lið í deildini fáa trupulleikar av teimum.

### Dysturin í tølum

**StÍF-VÍF 27-24 (14-14)**
Málskjúttar:
StÍF: Asta Petrauskiene 7(3), Alina Olaru 6(1), Anna Maria Berthelsen 6, Poula D. Olsen 5, Anna B. Danielsen 2, Sunfríð B. Jacobsen 1
VÍF: Sóley Mikkelsen 7(2), Nicoleta Radu 5, Fríða Marjunardóttir 4(1), Hertha Simonsen 2, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 2, Súna Jógvansdóttir 2, Alis Høghamar 1, Jacklin Durhuus 1
Brotskøst: StÍF 5, VÍF 3
Útvísingar: StÍF 2, VÍF 2
Dómarar úr H71: Jákup Símun Simonsen og Gunnar Djurhuus: Høvdu úr at gera við at dempa spælið, og hóast linjan kanska kundi verið harðari, so eydnaðist teimum so toluliga væl at fáa dystin at glíða, uttan at hørðu nærdystirnir gjørdust óreinir.